# ítróttur

Nr. 248 • týsdagur • 27. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Afrikani til EB/Streym



*Gongst eftir vil, so fær Sorin Anghel nigerianskan álopsmakkara í komandi ári*

**Ein nigerianskur áleypari kemur í januar mánaði at royndarvenja við EB/ Streymi**

Hesum hevur felagið boðað frá á heimasíðu sínari, www.eb-streymur.fo. Talan er um 21 ára gamla Joseph Odogu, og í felagsliðnum vóna tey, at hesin kann vera við til at hvessa álopspartin enn meira. Her hevur EB/ Streymur nú sagt farvæl við Sonna L. Petersen, sum fyri tveimum árum síðani vann gylta skógvin. Hinvegin er Sorin Anghel framvegis partur av liðnum, og hann plagar at vera góður fyri nøkur mál um árið.

So er spurningurin, um nýggi maðurin kann styrkja enn meira um hendan partin. Á pappírinum er talan um góðan spælara. Odogu sigst hava roynt seg á nøkrum av U-landsliðunum hjá Nigeria, men tað verður so ikki fyrr enn eftir royndarvenjingina, at endalig støða til sáttmála skal takast.

# Súni Fríði aftur á Toftum



*Toftfólk kundu um jólini fegnast um, at felagið hevur knýtt enn tveir spælarar at liðnum komandi kappingarár*

*Mynd: www.b68.fo*

**Saman við Magnus Jakobsen hevur Súni Fríði Barbá skrivað undir sáttmála við B68**

Á Argjum søgdu tey annars fyri tveimum mánaðum síðani, at tey høvdu tryggjað sær undirskriftina frá toppskjúttanum til komandi kappingarár. Súni Fríði skeyt í ár 31 mál í aðru deild, og var tí ein av høvuðsmonnunum handan royndina hjá AB at halda fast í heiðursmerkjaplássi. Sjálvur sigur Súni Fríði tó, at talan ongan tíð var um nakra formliga avtalu.

- Vit vóru sum so samdir um, at eg skuldi spæla á Argjum næsta kappingarár. Men AB visti tó av, at um eg fekk eitt tilboð frá einum liði í Formula-deildini, so kundi hetta broyta støðuna. Og tað er so eisini tað, sum er hent, sigur Súni Fríði.

Tað man eisini vera í B68-troyggjuni, at fólk flest kenna Súna Fríða. Hóast hann eisini hevur verið aðrastaðni og vent, so hevur tað fyrst og fremst verið í B68, at hann hevur gjørt um seg, og tað verður so her, at hann fer at spæla fótbólti komandi árið.

Saman við Súna Fríða er 25 ára gamli Magnus Jakobsen eisini komin inn á Toftir. Magnus er beiggi at nýggja B68-venjaranum, Jóannes Jakobsen, og eins og Súni Fríði, so spældi hann eisini við AB seinasta kappingarár - fyri tað mesta í miðverjuni.

**-mørk**

## Karstin aftur í ÍF-málið

**Hóast tað ikki er staðfest, so bendir nógv á, at klaksvíkingurin aftur skal verja málið hjá ÍF í ár**

Við keypinum av Paul Clapson, sum KÍ kundi staðfesta herfyri, bendir nógv á, at talan verður um nógvar málverjar í KÍ.

Men samstundis bendir eisini nógv á, at ein av málverjunum hjá felagnum nú er ávegis úr felagnum.

Karstin Joensen vardi í 2004 málið hjá ÍF, og sum skilst, so restar ikki nógv í, fyrr enn tað er ein staðfesting, at hetta eisini verður støðan í 2006.

Enn ber tó ikki til at fáa tíðindini váttað, men í ÍF hevur fyrr verið sagt, at felagið leitar eftir málverja til komandi kappingarár.

Hartil fær ÍF í januar mánaði eisini tveir bulgarar til royndarvenjing. Sum skilst, so eru allir smálutir viðvíkjandi einum møguligum sáttmála við hesar fingnir upp á pláss, men í Fuglafirði vilja tey fyrst síggja spælararnar, áðrenn nakar sáttmáli verður gjørdur.

**-Mørk**

## Ferguson leggur ikki kongin



*Sir Alex Ferguson ætlar sær at kempa víðari hóast mótvind*

Hóast hvassar atfinningar ímóti Sir Alex Ferguson seinastu tíðina hevur hann ongar ætlanir um at leggja frá sær

Tað hevur ikki verið gingið eftir vild hjá Ferguson seinastu tíðina. Liðið megnaði ikki at spæla seg víðari úr bólkaspælinum í Champions League, og avrikini í Premier League hava verið heldur svingandi. Tey krevjandi viðhaldsfólkini hava ikki verið nøgd og hava eisini givið sína ónøgd til kennar.

Men United hevur vent gongdini í landskappingini, og liðið liggur nú bert níggju stig aftanfyri Chelsea. Hetta er ein munur, ið United oftа áður hevur vunnið innaftur í seinnu hálvu av landskappingini.

Nógvar leysasøgur ganga í ensku fjølmiðlunum um, at Ferguson ikki heldur fram sum venjari eftir hetta kappingarárið, men Ferguson hevur ongar ætlanir um at taka seg aftur sum venjari í Manchester United.

- Hóast nógv halda, at mín tíð í United er farin, fari eg at halda fram sum venjari. Eg vil gera alt fyri at beina United aftur á rætta kós, slær Ferguson fast í samrøðu við Skysports.

Ferguson leggur afturat, at tað verður ikki lætt, tí at kappingin í Onglandi er beinhørð í løtuni. Eitt er, at Chelsea hevur eitt sera sterkt lið, men liðini í miðjuni eru eisini sterkari enn nakrantíð.

- Vit eru í holt við at endurbyggja liðið, og tað tekur tíð, men eg haldi, at vit eru nær við at náa málið, sigur Ferguson at enda.

Spurningurin er so, hvussu langan snór Ferguson fær frá nýggju eigarunum í Glazer familjuni.

**-SíS**

## Kyndilsliðini hittast ikki

Besta Kyndils-liðið skal í hálvfinaluni spæla móti StÍF, meðan teir næst bestu skulu royna seg móti VÍF

Í Kyndli høvdu tey uttan iva vónað, at tað skuldi bera til at vissa sær finalusessin longu nú. Hetta um tey bæði liðini skuldu brostið saman í hálvfinaluni.

Lutakastið lagaði tað nevnliga so, at StÍF fær heimadyst í fyrru hálvfinaluni, sum verður móti besta Kyndils-liðnum.

Hin hálvfinalan er so millum Kyhndil II og VÍF. Og á pappírinum líkist tað í øllum førum einum dysti, sum vestmenningarnir ikki eiga at fáa stórvegis trupulleikar av.

**-mørk**

## Stjørnan og VB í hálvfinaluni

Neistin og StÍF áttu tær báðar fyrstu kúlurnar, sum komu úr pottinum, tá lutur varð kastaður um hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini fyri kvinnur fríggjadagin.

Tað merkti samstundis, at aftur í ár bresta skulu VB og Stjørnan spæla hálvfinaludyst. Fyrri hálvfinaluni skal spælast 11. januar, meðan seinnu hálvfinalurnar verða spældar 25. januar. Hesir dagar kunnu tó flytast nakað.

**-mørk**